# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Politiska gongdin í Zimbabwe er harmilig, og fólkið ræðist stjórnina og Robert Mugabe, forseta*

*George W. Bush*

# Bush hartar Mugabe

**- Valið í Zimbabwe í morgin er ikki nakað veruligt val, sigur amerikanski forsetin**





*- Fólkið í Zimbabwe ræðist stjórnina hjá forsetanum, sigur George W. Bush*

- Gongdin í Zimbabwe hevur verið og er sera harmilig, og úrslitið er, at fólkið ræðist stjórnina og forsetan.

Tað sigur amerikanski forsetin, George W. Bush, dagin fyri umvalið í Zimbabwe. Bush, sum hitti umboð fyri trygdarráðið hjá ST, sigur, at talan er ikki um eitt veruligt val, tí eitt valevni sleppur ikki at reka sítt valstríð, og hansara veljarar kunnu ikki fara á valfund uttan at verða hóttir.

Robert Mugabe og stýri hansara halda fast um avgerðina at hava umval í morgin, sjálvt um andstøðuvalevnið, Morgan Tsvangirai, hevur tikið seg aftur.

# Yvirgangsmenn ætlaðu at søkja at oljuútbúnaði

**Myndugleikarnir í Saudiarabia siga seg hava tikið umleið 700 fólk við tilknýti til al-Qaeda, og at fleiri teirra høvdu lagt ætlanir um at søkja at týðandi oljuútbúnaði**



*Saudiarabia er heimsins størsta oljuútflytaraland. Her sæst bretski forsætisráðharrin, Gordon Brown, saman við umboðum fyri kongshúsið*

*Mynd: AP*

Av teimum umleið 700 sita 520 framvegis í varðhaldi. Teir eru úr ymsum londum og vórðu handtiknir í fleiri átøkum. Saudiarabisku myndugleikarnir vilja vera við, at fleiri av teimum tiknu vóru við í einari ætlan um at søkja at oljuútbúnaðinum og trygdardeildunum í landinum. Sum skilst ætlaðu menninir at brúka bilbumbur, og sambært myndugleikunum royndu fleiri av teimum tiknu at fáa arbeiði í oljuídnaðinum har eysturi í landinum.

BBC veit at siga, at ætlanin við atsóknini vara at órógva oljuflutningin til Vesturheimin, so at oljuprísurin skuldi hækka nógv afturat. Al-Qaeda hevur fleiri ferðir fordømt saudiarabiska samstarvið við Vesturheimin og hevur mælt saudiarabum til at leypa á kongsvaldið.

Keldur siga við BBC, at saudiarabiska løgreglan fann pengar, vápn og lóður undir húsarannsóknum í sambandi við handtøkurnar. Løgreglan viðgongur, at tað eru ikki oddafiskarnir, sum eru tiknir, tí teir fjala seg uttanlands. Saudiarabiska løgreglan hevur eisini illgruna um, at ætlanin var at fáa samband við menn í øðrum londum at taka lut í atsóknunum.

Sambært BBC hevði ein av teimum handtiknu eitt bræv frá næstovastanum í al-Qaeda, Ayman al-Zawahiri, har hann bað fólk savna pening til yvirgangsfelagsskapin.

Saudiarabisku myndugleikarnir hava verið sera avgjørdir, tá teir hava fingið minsta illgruna um yvirgangsætlanir, og amerikanska stjórnin dylur ikki fyri, at hon er sera fegin um, at myndugleikarnir hava tikið menn, sum ætlaðu at søkja at oljuídnaðinum.

- Vit fegnast um saudiarabisku luttøkuna í bardaganum ímóti yvirgangi, sigur talsmaðurin hjá amerikanska uttanríkisráðnum, Tom Casey, við AP.

## STUTT SAGT

## Ógilda deyðarevsing

Hægstirættur í USA boðaði í gjár frá, at fólk, sum eru funnin sek í at hava neyðtikið eitt barn, kunnu ikki dømast til deyða. Nakrir amerikanskir statir hava løggávu, sum heimilar dómsvaldinum at fella deyðadóm í málum, har børn eru neyðtikin, men avgerðin hjá Hægstarætti merkir, at hesir statirnir noyðast at seta tær lógirnar úr gildi, skrivar AP. Teir níggju dómararnir í Hægstarætti vóru minni enn so samdir um avgerðina. AP skrivar, at fimm dómarar atkvøddu fyri at ógilda lógirnar, meðan hinir fýra atkvøddu ímóti.

Hóast fleiri statir hava havt løggávu, sum hevur heimilað dómsvaldinum at brúka deyðadóm, tá børn eru neyðtikin, so er eingin deyðadómur feldur fyri tílíkt lógarbrot. Tey seinastu 44 árini er deyðarevsing bara brúkt í USA í sambandi við morð, skrivar AP.



*Dómararnir í amerikanska Hægstarætti vóru ósamdir*

*Mynd: Vísir*

## Tikin fyri ágang móti børnum

Spanska løgreglan hevur handtikið umleið 50 fólk í sambandi við eitt stórt mál um kynsligan ágang ímóti børnum. Løgreglan sigur, at umleið 60 hús og íbúðir um alt landið vórðu rannsakað, og at løgreglan legði hald á fleiri hundrað teldur. Tað var gott samstarv millum myndugleikarnar í Spania og Italia, sum endaði við handtøkunum, sigur spanska løgreglan.